HOYVÍKAR SKÚLI

**<u>Skúlastýrisfundur</u>**

Hósdagur, 01. mai 2024 kl. 16.30 – 18.00

| | |
|---|---|
| **Á fundinum vóru:** | Rannvá Mortansdóttir, Jógvan Páll Fjallsbak, Leivur Simonsen, Anna Maria Reinert Jensen, og Malan á Dul Nielsen |
| **Avboð:** | Gunnvør Balle |
| **Ikki møtt:** | Laila Hentze, Kristianna W. Poulsen |
| **Fundarleiðari:** | Rannvá Mortansdóttir |
| **Skrivari:** | Malan á Dul Nielsen |

**Skrá:**

1. Eftirmeting av foreldrakvøldinum 24. apríl:

Tað varð væl møtt, og alt í alt eydnaðist tað væl, og evnið var eisini áhugavert. Tað verður longu farið í gongd við at finna okkurt áhugavert evni til næstu ferð.

2. Leiðslan kunnar:

   Leiðslan hevur verið og vitjað Hoydalar sum eitt alternativ at hýsa okkum, meðan ein nýbygging fer fram. Niðurstøðan er púra greið: Vit kunnu ikki hýsast í Hoydølum, tí skúlin er snøgt sagt ov illa farin, hóast fleiri hølir vóru góð í støðd. So talan er evt. um pavilliongir.

   UVS sigur, at nýggi skúlin skal vera trý spor.

   Skúlastýrið saknar at vera meira innvolverað í tekningar og annað, sum kommunan ger í sambandi við skúlabyggingina.

3. Ferðslufundur hevur verið ídag við ein konsulent hjá kommununi. Stjórin og forkvinnan í skúlastýrinum vóru við. Tað var serliga vestara síða, sum varð tosað um frá okkara síðu.

4. Fíggjarætlanin

Vit halda okkum innan fyri játtaðar fíggjarkarmar, og tað hava vit ætlanir um.

5. Trivnaðarkanning
   Trivnaðarkanningin fyri okkara skúla er eitt sindur hægri enn miðal samanborið við alt landið. Har er okkurt úrslit, sum yvirraskar okkum, tí vit hava mett støðuna at hava verið verri enn kanningin í roynd og veru vísir.
   Vit meta, at næmingaráðið er umráðandi at hava við í hesum punktinum, tí tey eru umráðandi viðv. trivnað, tí tey skulu innyvir ymsar felags skúlareglur. Okkara næmingaráð hevur ligið lamið í ár; tað mugu vit staðfesta, og hetta mugu vit sum skúli fáa upp at koyra aftur.
   Trivnaðarætlanin hjá okkum liggur ikki á heimasíðuni, men hon burdi verið kókað niður og løgd út.

6. Skal skúlastýrið gera okkurt meira aktivt í sambandi við skúlabygging.
   Foreldraumboðini hava einki ímóti at gera eitt skriv fyri at leggja trýst á.

Fundurin lokin kl. 18:15